*Árni Olafson, leiðari í samráðingarnevnd:*

# Bretar eiga útspælið

*Sera spennandi fundur i London i dag um markið millum Føroyar og Bretland. Fundur er beint i kjalarvørrinum á fundinum millum løgmann og bretska uttanríkisráðharran um sama mál*



*Heralvur Joensen, ið starvast sum løgfrøðingur á oljufyrisitingini. Hann luttekur fyri fyrstu ferð í marknasamráðingunum. Mynd kalmar*

I dag verður fundur aftur millum føroyingar og bretar um marknaðsemjuna landanna millum. Hetta er tann nógv umrøddi fundurin, sum eisini varð á skránni hjá teimum báðum, Edmund Joensen, løgmanni og Douglas Hurd, uttanríkisráðharra í Keypmannahavn herfyri.

Stórur spenningur er um henda fundin, nú tað, ið líkist naggatoðn, hevur verið í málinum.

Bretar eiga útspælið nú segði føroyski samráðingarleiðarin Árni Olafson við útvarpið í farnu viku.

Við hesum sipar hann til, at føroyingar á seinasta fundinum gloppaðu hurðina eitt sindur, tá teir løgdu fram uppskot um eitt mark, sum - eftir tí vit hava frætt - liggur nakað vestan fyri ta miðlinju, sum føroyoyingar annars hava mett sum mark men langt eystan fyri ta linju, sum bretar hava kravt sum mark.

Ætlanin var at hava fund aftur í fjør, men eftir bretskum ynski varð hann útsettur til óásetta tíð. Bretar ynsktu at hava góða tíð til at meta um føroyska útspælið. Síðani er tað hent, at bretar ynsktu, at teirra uttanríkisráðharri skuldi møta Føroya løgmanni á einum fundi í Keypmannahavn. Hesin fundur skuldi upprunaliga vera í november men var útsettur og varð so hildin fyri góðari viku síðani.

Á tí fundinum varð greitt, at báðir partar ynskja eina samráðingarloysn og hvør in parturin heldur, at allir samráðingarmøguleikar eru úttømdir.

Sum Sosialurin hevur skilt tað, so vilja bretar sleppa undan at fara til Haag. Hvør grundgevingin er fyri hesum annað enn, at teir halda tað ber til at greiða málið við samráðingum vita vit ikki. Men tað ljóðar, at bretar leggja so mikið stóran dent á hetta málið, at tað meira ella minni er tikið úr hondunum á oljumálaráðharranum Tim Eggar og latið upp í hendurnar á sjálvum uttanríkismálaráðharranum Douglas Hurd.

Árni Olafson ynskir ikki at gera viðmerkingar til málið nú undan fundinum.

**Nyggjur maður í samráðingarnevnd**

Í føroysku samráðinganevndini eru umframt Árna Olafson eisini Martin Heinesen., Trygve Johansen, Dánjal Nolsøe og Heralvur Joensen umframt danir frá orkumálaráðnum og uttanríkismálaráðnum.

Hetta er fyrstu ferð, at Heralvur Joensen er við í samráðingunum. Hann starvast sum løgfrøðingur á oljufyrisitingini, har hann fæst við at skapa eina lógarkarm um framtíðar gongdina í oljukanningum.

Heralvur Joensen hevur frammanundan starvast í Danmark við júst altjóða havrættarspurningum.

jan



*Stórur spenningur er um fundin í London í dag. Tað eru bert fáar dagar síðani, at løgmaður hitti bretska uttanríkisráðharran á máli um júst sama spurning. Mynd Politiken.*


VIKU TILBOÐ

| | |
|---|---|
| PEPSI COLA 1,5 l v. pant/1 fl. | 13,95 |
| PEPSI COLA 1,5 l v. pant/4 fl. | 50,00 |
| JACOBs TEATIME 400 gr. | 12,95 |
| HELLAS SJOKULÁTA jarðb., 100 gr | 5,95 |
| LAKRESKONFEKT Lagerman 205 gr | 17,95 |
| REYÐKÁL Herregårds, 1 kg. | 13,95 |
| REYÐKÁL Herregårds, 2 kg. | 22,95 |
| EPLAMOS Økers, 440 gr. | 13,95 |
| SUPER VASKIPULVUR 3 kg./4 pk | 100,00 |
| OKSAFILE fyri kilo | 28,95 |
| OKSA-INNANLÆR fyri kg. | 27,95 |
| NAKKASTEIKIR fyri kg. | 29,90 |
| SVÍNAKOTELETTIR fyri kg. | 39,95 |

*Hesa vikuna so leingi vøran røkkur!*

HANDILSVIRKIÐ
P. A. RESTORFF
Sigmundargøta 1 Tlf. 14733

sosialurin – *er altíð á staðnum*